## DAGSINS MEINING

# Fjølmiðlar og kritikkur

Tað er gott við positivum kritikki. Slíkur kritikkur kann menna, skapa og seta nakað í gongd hjá tí, sum kritikkurin er vendur ímóti. Eisini vit, sum fáast við blaðvirksemi, hava brúk fyri regluligum ummæli ella kritikki, um vit skulu menna tað avrik, sum vit dagliga bjóða fram. Týsdagin høvdu tveir mentamenn fingurin á lofti. Steinbjørn B. Jacobsen heldur, at skrivingin í Sosialinum er partapolitisk litað. Sosialurin er farin í runudíkið, liggur í súrgurennu. Og har verður blaðið liggjandi, sigur rithøvundurin, mentamaðurin og óhefti eygleiðarin, gamli háskúlastjórin.

Ein annar rithøvundi, Árni Dahl, vísir á, at "hvør fjandi hevur sína tíð". Hann sipar til útspillingarherferðir ímóti fólki og rørslum. Og upp í hetta selskap, sleppur Sosialurin eisini. Hann gloymir bara - tilvild ella ikki - 14. september, sum ikki altíð var eitt av bestu guðs sunnudagsskúlabørnum. Fyrrverandi oddamaðurin á Fríu Føroyum skuldsetur Sosialin fyri at hava hundbeitt og felt Helenu Dam á Neystabø og Torbjørn Jacobsen. Hvørgin sparir upp á krútið. Og tað brúka teir Dimmalætting til. Hóast teir eisini vóru vælkomnir at brúka teigapláss í Sosialinum.

Tíðindaflutningurin á blaðnum er ikki partapolitiskt litaður! Eins og á øllum øðrum fjølmiðlum eru tíðindafólkini óheft. Men sjálvandi skulu tey halda seg til góðan blaðsið. Tað er tí at niðurgera tíðindafólk á Sosialinum at skíra avrikið hjá teimum fyri vera ávirkað partapolitiskt. Men hvat meinar Árni Dahl við, tá hann sigur, at Sosialurin feldi Helenu. Um hann ikki minnist gongdina, kann upplýsast, at tað var ein frágreiðing um eitt eftirlønarmál, ið løgmansskrivstovan gjørdi, ið feldi Helenu. Men sjálvandi viðgjørdu allir fjølmiðlar hesa hending. Vit hava blaðað aftur, men hvørki oddagrein ella onnur blaðgrein hundbítur Helenu. Tvørturímóti.

Um Torbjørn er at siga: Sosialurin hevði eina samrøðu við Torbjørn, har hesin legði harðliga eftir løgmanni. Tá greinin var prentað, pástóð hesin, at hetta hevði hann ikki sagt. Men bandupptøkan, sum SVF kunngjørdi, vísti nakað annað. Tað var ikki Sosialurin, men Torbjørn, sum kom sær upp í rasshaft! Seinri høvdu vit eina grein um hendingarnar í Vestmanna skúla, tá hann bað danskan lærara fara av fundi. Hetta var avdúkandi, men skuldi Sosialurin tagt tað burtur, at landsstýrismaðurin ikki dugdi vanligt kurteisi? Henda røð av hendingum, og aðrar við, feldu óivað komandi fólkatingslimin. Men hvør kom sær upp í rasshaft? Hvussu ber tað til, at somu menn, sum nú seta stór og rímulig krøv til miðlarnar, samtíðis skuldseta somu miðlar fyri hundbíting, tá teir royna at liva upp til hesi krøv?

Umframt at vera eitt tíðindablað, er Sosialurin eitt kjaktorg. Men fyri at sleppa undan huldumonnum, krevja vit, at allar greinir skulu hava navn undir. At hesar eisini eru politiskar, úr øllum sjónarhornum, eisini úr Steinbjørnsa, er ein sjálvfylgja. Men vit seta eisini mark við atliti til vanligan blaðetik. Sum eitt kuriosum kann upplýsast, at vit hava sáldað greinir frá, m.a. sum spiltu varaløgmann og hansara familju út, men sum annað blað helt vera borðbara.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kabalin, ið ikki gongur upp

**Heri Mohr**



Í bóklinginum ”Frá heimastýri til fullveldi” (síðu 26), sum landsstýrið lat bera í hvørt heim í Føroyum, er kunngjørt, at av ríkisstuðlunum ”eru hesi farnu árini millum 300 og 400 milliónir brúktar til rakstur av tí føroyska samfelagnum”. Og á somu síðu er framhildið, at ”í ár 2000 verður minni enn ein triðingur av tí danska stuðlinum brúktur í samfelagnum. Restin fer til samansparingar, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd”.

**1. januar 1997 – 31. desember 2000**

| | |
|---|---|
| Skattir, gjøld v. m. | 10.644 milliardir |
| Ríkisstuðul | 4.727 ” |
| Nettoavlop | 1.035 ” |

Um vit ímynda okkum, at ongin ríkisstuðul kom í landskassan í hesum tíðarskeiði (4 ár), vildi myndin sæð soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Nettoavlop | 1.035 milliardir |
| minus ríkisstuðul | 4.727 ” |
| Nettohall | 3.692 milliardir |

Men halda vit okkum til landstýrisins frásøgn um, at einans millum 300 og 400 milliónir av árligu stuðlunum úr Danmark eru brúktar til rakstur av tí føroyska samfelagnum, so sær myndin soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Nettoavlop | 1.035 milliardir |
| minus 4 x 350 mió. | 1.400 ” |
| Nettohall | 365 milliónir |

Og taka vit so samansparingina, sum skal nýtast, um búskapurin verður fyri afturgongd, sær myndin soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Ríkisstuðul | 4.727 milliardir |
| minus eftirgeving av ríkislánum | 0.900 ” |
| minus brúkt til rakstur av samfelagnum | 1.400 ” |
| Til samansparing | 2.427 milliardir |
| minus nettoavlop | 1.035 ” |
| Írestar | 1.392 milliardir |

Hetta gevur okkum orsøk til at kanna, hvussu hesar týdningarmiklu frásagnir landsstýrisins samsvara við veruleikan.

Sum ”hesi farnu árini” er hóskandi at taka tíðina frá 1. januar l997 til 31. desember 2000, t.v.s. árini l997, l998, 1999 og 2000. Ein slík kanning kann bert gerast við at lesa landskassans ársroknskapir:

*Sí talvu!*

Í hesum álvarsmáli, sum er vorðið kardinalspurningur í okkara ríkisrættarligu støðu mótvegis Danmark, má tað ikki koma uppá tal, at fólk ivast í trúðvirði landsstýrismanna. Tessvegna er tað ikki meira enn sjálvsagt, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum greiður føroya fólki frá, hvar restin av ríkisveitingunum - 1.392 milliardir – er at finna: er tað farið millum skins og hold? hvar skulu vit leita?

Ella er hetta brúkt til rakstur av tí føroyska samfelagnum uttan landsstýrisins vitan?

Núverandi løgtingsformaður greiddi okkum frá í ”Dimmalæting” tann 2. desember 1993, at ”tann veruligi ríkisstuðulin verður tá 0 krónur. Vit skulu sjálvir gjalda fólka- og avlamispensión, skúlaskap, sjúkrahús …”. Og hann pástóð víðari, at ”ríkisstuðulin skjótt ikki verður annað enn mótroknaður teirri skuld, landskassin fer at hava hjá ríkiskassanum, og ”gagnið” av stuðlinum verður tá burtur…”.

Hesin dómadagsprofetiur gekk ikki út, tí sum kunnugt hevur núverandi samgonga fingið meira stuðul úr ríkiskassanum enn nøkur onnur samgonga, men hvussu mikið av ríkisstuðli er mótroknað skuldini, sum landskassin hevði/hevur hjá ríkiskassanum átti kanska at verið kannað, tí kabalin má onkursvegna ganga upp – uttan at snýta.

Vit hava tveir lyklar at loysa kabalina við: annar er 0 krónur í veruligum ríkisstudningi, sum núverandi løgtingsformaður skrivaði um í desember mð. 1993, og hin er 4.727 milliardir í ríkisstudningi, harav eru 1.4 milliardir farnar til rakstur av tí føroyska samfelagnum, soleiðis sum landsstýrið fráboðaði Føroya fólki einaferð í fjør við proklamatiónini ”Frá heimastýri til fullveldi”.

Álvaratos. Verður tað ikki soltið í tí andaliga og handaliga goymslubúrinum, nú menn í óðum verkum eru farnir at ”tøma” heimastýrislógina – oyst verður við frælsiseyskari – og við henni at kalla alt lógarstøðið undir vælferðini?

Men samgonguduettin kvøður eggjandi:

Vinstra, høgra
vinstra, høgra
tað er rætta greipan,:
tøma vit væl,
verða vit sæl,
soleiðis skulu vit tøma.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Skomm at føroyingar ikki duga at skriva føroyskt!

**Hanna Pálsdáttir Vang**

Tað er skomm, at føroyingar ikki duga at skriva sítt egna mál, og hví er tað so? Høvuðsorsøkin liggur í ’ð’inum. Tað eru ov nógv ’ð’ í tí føroyska málinum. ”Hvar skal mann seta hetta vælsignaða ’ð’ið?” – hetta er ein trupulleiki, sum nógv stríðast við.

Eitt gott hugskot hevði verið at endurskoða rættskrivingina, og hugsa um, um mann ikki átti at strika ð’ið í ávísum støðum. Tað kundi t.d. verið í boðshátti (2.pers. fleirtal), 2. lýsingarhátti og í bundnum hvørkikynsorðum, tí har verður tað als ikki framborið. ’ð’ verður framborið sum /g/, /j/ ella /v/ í ávísum øðrum støðum.

Tað eru nógvir føroyingar, sum umseta til danskt fyrst fyri at vita, um orðið á donskum endar við ’t’, tí so skal tað hava ’ð’ á føroyskum. Tað líkist ongum, at mann skal noyðast um eitt annað mál fyri at koma fram til sítt egna.

Eitt er, at mann skal varðveita tað upprunaliga norrøna, men heilt erligt varðveitanin av tí upprunaliga átti ikki at komið fram um førleikan hjá tí vanliga føroyinginum at stava. Vit hava ár 2001 nú, og føroyskt er altso ikki so líkt norrønum longur.

Tað eru sjálvsagt føroyingar, ið duga at stava, og serliga teir, sum eru málsinnaðir; men tað eru so nógva ferðir fleiri føroyingar, ið ikki duga at stava, og mann kann ikki hava eina rættskriving, sum bara nakrir fáir málfrøðingar skilja.

Ein áheitan til teirra, sum hava myndugleika til tess: endurskoði(ð) rættskrivingina!

# Viðmerking til grein hjá Árna Dahl í Dimmalætting týsdagin 04.12.01

**Sigvald Kristiansen**
*Skála 04.12.01*



Góði Árni!

Góð grein, sum eg taki fult undir við, tí tað harmar almikið, tá tær góðu ætlanir við upplýsing og tíðindaflutningi og orðaskifti og øðrum, sum tey ymisku bløðini settu sær fyri at bera út til fólk, av ymiskum orsøkum í vissum førum vórðu bendar á skeiva leið, og sum tú skrivar, at spilla kom í. Tú nevnir nógv bløð, men eg haldi, tú hevur gloymt Fjúrtanda, sum í 60-unum áhaldandi kallaði Petur Mohr Dam fyri Petur Morð Dam. Man merkt die Absicht und wird verstimmt. Tað var hugtungt ta tíðina, at síggja hatta upp á prent. Vónandi er tað av misgáum, at tú ikki hevur tikið eitt slíkt dømi við í grein tíni.

# Føroyar skulu vera fræls tjóð í Ríkinum

**Tummas Eli Høj Joensen**



Føroyar skulu vera fræls tjóð í Ríkunum. Tað persónliga frælsið skal tryggjast og øll tey, ið skulu hava eina ella aðra almannaveiting, skulu hava hesa veiting á sama støði, sum í okkara grannalondum.

Vit skulu ikki í Føroyum góðtaka, at fjølmilar og onnur dagliga siga okkum, at danskarar, ið eru somu ríkisborgarar sum vit, fáa næstan tað dupulta í pensión og allar møguligar aðrar sosialar sømdir á einum nógv hægri støði enn vit kunnu gerða okkum nakra vón um at fáa her á landi.

Hetta, at tað skal vera so, er ikki fyri tann føroyska borgaran rætt, og tí skulu vit ikki góðtaka hetta. Landstýrið við hesum trimum flokkunum, mátti eisini kunna roknað hetta út. Einki kann longur haldast fjalt.

Miðlarnir eru ov lætt atkomiligir hjá fólki. Øll verðin er inni í okkara stovu hvønn einasta dag og tí vita fólk, ið fylgja eitt sindur við, hvussu livikorini eru hjá øðrum.

Landstýrið kann ikki blíva við at halda, at føroyingurin trýr, at alt verður betri um vit fáa laga tað til sokallaði føroysk viðurskiftir.

**Føroysk viðurskiftir**

Hvat eru føroysk viðurskiftir? Eru tað lægri pensiónir, minni almannaveitingar, súklur til heimahjálparar og helst viðgerð á einum sjúkrahúsi, har øll á deildini siga seg úr starvi, tí at landstýrið ikki finnur útav, hvussu teir skulu játta pening?

Orsaka meg, at eg sigi so; men sigur landstýrið ikki, at tað eru ongantíð játtaðir so nógvur peningur til landsjúkrahúsið sum nú ? Tey, ið arbeiða har, siga seg ongan pening at síggja. Tey spyrja

“ HVAR ER PENINGURIN TEIR SIGA SEG AT HAVA JÀTTAÐ ? “

Eru hetta føroysk viðurskiftir ella hvat ? Vilja vit Føroyingar veruliga hetta ? Skal tað fyri nakran føroying verða ein ótti at blíva gamal, sjúkur ella óhjálpin?

Eg haldi, at Fólkatingsvalið prógvar fyri núverandi landstýri, at fólk ikki eru so altráð eftur teimum sokallaðu føroysku viðurskiftunum, men vilja hava hjálp, har hjálp treingir til. So kann tað vera líkamikið hvussu landskassin fær førleikan til at veita hesa hjálp !

**Føroysk viðurskiftir eru ikki fullveldisviðurskiftir**

Eg haldi, at vit skulu ístaðin kalla tað føroysk viðurskiftir, tá tað ber til og tá alt er sum tað skal vera. Tá øll, ið skulu hava hjálp, fáa hjálp og pensiónin er til at liva av.

Tað sum landstýrið kallar føroysk viðurskiftir (har føroyski borgarin veit, at einki ber til), kunnu vit ístaðin kalla fulveldisviðurskiftir.

Nei, latið okkum føroyingar bretta upp um armar og velja eitt nýtt løgting (og harvið landsstýri), ið kann fáa øll hesi viðurskiftir í rættlag og gera Føroyar til eitt frælst land í ríkinum. Eitt landstýrið, ið ikki blakar inntøkur fyri borð, vælvitandi um, at hesar inntøkur kundu komið borgarunum tilgóðar.

# Samgongan í Tinganesi kúvendir!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Teir hava fingið kaldar føtur av yvirtøkumálinum: Vágar lufthavn!

Gott teir ikki tordu at taka fullveldið her og nú við 4 ára skiftistíð, tí nú tora teir heldur ikki at yvirtaka flogvøllin og tað er av góðum grundum.

Tann føroyski fólkaflokkurin er á afturferð í tí fyrr so bræsna yvirtøkumálinum: Vágar lufthavn. Og løgmaður hevur funnið ein frens til umbering fyri kúvendingina, og tað er leiðarin av flogvøllinum, sum í ÚF segði tað, vit øll vistu frammanundan, at útbyggingin av lufthavnini steðgaði, tá fullveldislandsstýrið kom til.

Annars hevur fólkaflokkurin róst dønum fyri góðar samráðingar at yvirtaka Skipasýnið og flogvøllin?

Kanska hevur hendan støðutakanin nakað at gera við tað, sum hendi 11.09 í ár og eftirfylgjurnar, tí valla hevði AA flogið í heyst, um ikki tann danski staturin gav trygd fyri flogferðsluni við milliarda upphæddum. Hettar man vera ein feruleiki, sum løgmaður og hansara flokkur hava hugsað nógv um, tá avgerðin um at steðga yvirtøkuni av floghavnini varð tikin.

Annars kundi landsstýrið haft mælt dønum til at nýtt nakrar av teim 367 milliónum krónum fyri árið 2002 til flogvallarútbygging, ístaðin fyri at avskrivað hendan okkara rætt til nevnda pening.

Nú er sirkus »fullveldið her og nú« fullkomið. Nú hevur smagongan sjálv ásannað, at hettar ber ikki til. Í fýra ár hava vit bert yvirtikið eitt mál: Skipasýnið, og tað er enn tá ikki fult yvirtikið, tí vit megna ikki fult at umsita hettar mál, sum hevur internationalar relatiónir. Og teir søgdu, at tað var bert eitt kontór í Havn at yvirtaka, men teir eru nú vornir klókari?

Síðani hevur hendan samgongan avskrivað kr. 367 milliónir fyri árið 2002 meðan føroyska samfelagið skríggjar eftir hesum peningi til: útbygging av Vága lufthavn, landssjúkrahúsinum, skúlaverkinum, eftirlønum, íbúðarviðurskiftunum o.s.fr.

Hettar er avrikið hjá sitandi fullveldissamgongu í 3 1/2 ár. Men hendan samgongan eigur okkurt met kortini, og tað er í streikum á tí føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Tó eitt skal løgmaður og hansara flokkur eiga: Tað er gott og rós vert, at tey nú loksins hava ásannað: tað ber ikki til at framskunda sjálvstýristilgongdina so ógvusligt, sum hendan samgongan legði út við, tí vit eru hvørkin før fyri at umsita ella gjalda so ógvuslig tøk í einum, og als ikki at taka tær avleiðingar, sum har fylgja.

Ein kendur danskur fyrrverandi politikari segði: »man har i politik altid lov at blive klogere«. Tað er løgmaður nú loksins blivin, og tað er gott!

Fyri hvønn dag, sum gongur, gerst tað meira greitt fyri Føroya fólki – eisini loysingarfólkinum, sum nú legst á fjølmiðlarnar – at politikkurin seinastu 3-4 árini vildi ført okkum í óføri, slapp hann at vera førdur út í lívið, men hann er miseydnaður, og tað ásanna nú sjálvt samgonguflokkarnir. Tað er seint, men gott, at teir gera tað. Vit onnur hava vita tað alla tíðina.

Í Føroyum treingja vit til ein nýggjan politikk.